# Fingu hval í nótina

Manningin á íslendska sildaskipinum Guðmundi, sum er úr Vestmannaoyggjunum,og sum roynir við Jan Mayen, fekk ein lítlan hvøkk fyrradagin. Tá nótin var komin at borði, vísti tað seg, at ein sildreki var í henni. Hvalurin hevði sløkt seg væl og virðiliga inn í nótina, so tað tók eina góða løtu at fáa hann leysan, Síðani bleiv hann skorin ull. Morgunblaðið skrivar, at hvalurin var millum seks og sjey metrar til longdar. Tvøstið fylti trý fiskakør.



# Útseta kópaveiði

Ein grønlendsk ætlan um at veiða kóp og at lata móðurskip taka ímóti er fyribils løgd til viks, sigur grønlendska útvarpið. Aðalstjórin í fiski- og veiðimálaráðnum, Amalie Jessen, sigur, at verkætlanin er útsett, til kjakið um kópaveiði hevur lagt seg. Sjálv væntar hon ikki, at tað hendir í bræði og vísir á, at júst nú umrøður ES eitt uppskot um at banna limalondunum at innflyta úrdráttir úr kópi. Veiðimannafelagið KNAPK tekur undir við at útseta ætlanina.

# fiskidagatal



*Fiskidaganevndin hevur býtt seg í ein meiriluta og tveir minnilutar. Meirilutin, sum í fyrsta lagi eru vinnufeløgini í nevndini, mælir til óbroytt fiskidagatal*

*Tilvildarlig mynd*

fiska í føroyskum sjógvi.

Nevndin heldur, at eftirlitsfólkini eiga at hava heimild til at steða veiði eftir pelagiskum fiski, tá hjáveiðan fer yvir eitt ávíst mark.

- Vit hava framvegis ta fatan, at svartkjaftaflotin fiskar nógvan botnfisk sum hjáveiði, og vit halda, at stóra svartkjaftaveiðan undir Føroyum hevur beinleiðis ávirkan á støðuna hjá okkara fiskastovnum.

Fiskidaganevndin mælir annars til, at øll veiða á firðum og sundum verður steðgað í eitt ár, og mælt verður eisini til, at eingin veiða verður loyvd innanfyri ein fjórðing úr landi.

- Vit mæla til, at øll vinnulig og frítíðarveiða innanfyri ein fjórðing úr landi hvílir í eitt ár, sigur hon.

Nevndin heldur ikki, at hjáveiðikvotan hjá lemmatrolarum skal takast av, men loyvt eigur ikki at vera at royna á ytru og innaru leið á sama túri. Hjáveiðikvotan at fiska tosk og hýsu á innaru leið eigur at verða broytt til í mesta lagi 3%.

Í sínum tilmæli viðger fiskidaganevndin eisini toskin á Føroyabanka, sum eftir hennara tykki er so illa fyri, at okkurt, ið veruliga munar, má gerast. Mælt verður til at steingja Føroyabanka fyri allari veiði í eitt ár – við undantaki av landsynningskantinum, øki a.

Lemmatrolarar eru ikki við í fiskidagaskipanini, men síðan sína fyrstu frágreiðing og tilmæli hevur fiskidaganevndin mælt til, at øll veiða eftir botnfiski á føroyskum øki skal verða innanfyri skipanina.

- Lemmatrolararnir eiga at koma inn í skipanina eftir sama leisti sum hinir bólkarnir upprunaligu komu inn í skipanina og við teimum niðurskerjingum, sum hava verið í skipanini, síðan hon kom í gildi. Sama er galdandi fyri garnaskipini, sigur nevndin.

Mælt verður eisini til, at útlendsk skip, sum fiska undir Føroyum, eiga at byrja og enda veiðina í føroyskum sjógvi.

- Tað skal ikki bera til at koma inn í føroyskt øki á sama túri sum útlendsku skipini fiska í øðrum sjógvi. Eftirlit er nærum ómøguligt, tá fiskast kann innan fleiri landamørk á sama túri, heldur nevndin.

## Javnvágin av lagi

Fiskidaganevndin hevur í fleiri ár mælt til eina dagføring av teimum útrokningum av veiðiorkuni býtt eftir bólkunum, sum liggur til grunds fyri fiskidagaskipanini, men higartil er einki hent.

- Í ár er fiskiorkunevndin komin við ávegis frágreiðing, men í ávegis álitinum er einki gjørt við útrokningarnar, sum liggja til grunds fyri fiskidagaskipanina. Í niðurstøðuni sigur fiskiorkunevndin, at hon ikki kann gera nakra endaliga niðurstøðu, um skipanin hevur tryggjað, at veiðan er hildin innan fyri lívfrøðiligu karmarnar, so at í miðal bert ein triðingur av stovnunum verður veiddur á hvørjum ári. Hetta kann ikki vera gjørt, fyrr enn Fiskirannsóknarstovan hevur gjørt útrokningar av fiskidagatalinum fyri fiskiárið 2008-2009. Fiskiorkunevndin sigur seg vilja koma aftur til hetta, tá útrokningarnar eru tøkar.

Fiskidaganevndin væntar ikki, at tilfarið verður tøkt til fiskidagaárið 2008/ 2009.

- Vit halda, at upprunaliga javnvágin í veiðiorkuni er farin av lagi, og tí verður neyðugt at finna eina nýggja javnvág.

## Ikki semja

Fiskidaganevndin, sum nú hevur handað landsstýrismanninum frágreiðing og álit, heldur, at tá fiskiorkuálitið ikki er tøkt, hevur nevndin einki amboð at taka støðu út frá viðvíkjandi veiðiorku.

Í ár er fiskidaganevndin ikki samd um dagatalið fyri fiskiárið 2008/ 2009. Nevndin hevur býtt seg í ein meiriluta og tveir minnilutar.

Meirilutin, Theodor Poulsen, Auðunn Konráðsson og Dánjal Jákup Vilhelm meta, at dagatalið fyri komandi fiskiár ikki eigur at verða broytt. Tí mælir meirilutin til, at allir bólkar varðveita sítt fiskidagatal komandi fiskiár.

Meirilutin metir, at fiskidagaskipanina er ein langtíðar javnvágarskipan, har fiskidagatalið ikki skal stillast – hvørki upp, tá nógvur fiskur er ella niður, tá minni er til. Tað einasta, sum kann broyta dagatalið, er broyting í veiðiorkuni, og meirilutin metir ikki, at ógvuslig lop hava verið í veiðiorkuni hetta síðsta árið.

Minnilutin Dánjal Jacobsen hevur gjørt eina meting av broytingini av fiskiorkuni í bólki 2, sum er partrolarar. Metingin er, at fiskidagatalið eigur at minkast við 10%. Hetta er gjørt við atliti til, at dagatalið síðan 1996 er lækkað. Óli Samró og Eyðun Johannesen taka undir við Dánjali Jacobsen.

Í ískoyti til álitið og tilmælið sigur Óli Samró, formaður í fiskidaganevndini, at serlig inntriv mugu gerast fyri at minka um veiðina eftir toski, serliga tí smáttfallandi toskinum. Óli byggir hesi sjónarmið á greiningarnar hjá Fiskirannsóknarstovuni sum siga, at støðan hjá toskastovninum er hættislig.

- Um skipanin øll sum hon er ikki verður gjøgnumgingin og stillað eftir tí veruleika, sum er í 2008 innan nýggja fiskidagaárið byrjar í september, mæli eg til eitt serligt inntriv í dagatalið hjá teimum bólkunum, sum fiska mesta toskin, sigur Óli Samró.

Umboðið hjá Føroya Fiskimannafelag í fiskidaganevndini, Eyðun Johannesen, tekur undir við formanninum í nevndini.